## Nygaard skoraði og varð útvístur

Hálvi tvørámaðurin Marc Nygaard var rættiliga í brennideplinum í dystinum ímillum Queens Park Rangers og Watford leygardagin. Hann skoraði málið hjá QPR í 1-2 tapinum, men varð síðani vístur av vøllinum. Fyrst fekk hann gula kortið fyri at lata seg úr troyggjuni, eftir at hann hevði skorað, og løtu seinni fekk hann seinna gula kortið fyri at brúka seg.

– Marc veit, at hann sveik liðið. Hann vil sera fegin gera tað gott aftur, men við hvørt er neyðugt at stýra sær. Møguliga verði eg noyddur at geva honum eina bót, sigur QPR-venjarin Gary Waddock við BBC.



## Coventry vann

Coventry vann leygardagin sín dyst í næstbestu ensku deildini. Claus Bech Jørgensen spælir ikki aftur í hesum kappingarárinum vegna skaða, men liðfelagarnir fingu trý stig við heimaftur úr Stoke. Innskifti Adebola skoraði málið fimm minuttir fyri leiklok. Coventry liggur nú nummar 11 við 60 stigum.

KÍ-VB/Sumba 3-0 (3-0):

# Heðin var við í øllum

*KÌ*

*VB/Sumba*

**Klaksvíkingar spruttaðu í fyrra umfarinum, tá ið teir avgjørdu móti VB/Sumba, sum eftir steðgin vísti, at teir eru ikki púra sørir**

**KÍ-VB/SUMBA**
*Jóannes Hansen*

Tað var gott lag í Klaksvík sunnudagin. Eftir rennitúrin ella gongutúrin undir Leirvíksfirði bar fótbóltshugaðum norðoyingum til at staðfesta, at tað framvegis ber KÍ til at vinna á heimavølli. Tað hava teir ikki megnað so ofta tey seinastu árini, og fyrsta royndin í ár – móti Skála -–var ikki meiri enn passalig.

Frá fyrsta bríksli var gongdin tann, sum tað kundi roknast við. VB/Sumba kendi sín leiklut, teir høvdu nógv fólk aftarlaga á vøllinum, og Evrard Ble var orduligur aftasti maður. Marcin Dawy røkti sín leiklut til fulnar.

KÍ var í 4-3-3 útgangsstøðu. Setningurin var at tosa spælið út í borðini, har Hjalgrím Elttør og Heðin á Lakjuni vóru, og spælið hekk rímuliga saman undan steðginum. Men hóast KÍ trýsti nógv, so gekk tað meiri enn hálvur tími, áðrenn hol kom á. Tá høvdu Ovi Nysted og Heðin á Lakjuni eftir hornasparksinnlegg havt góðar stútarar, sum kortini ikki góvu mál.

Í hesum førinum sum í hinum báðum førunum innan fyri næsta korterið, tá ið KÍ økti til 2-0 og 3-0, var KÍ liðformaðurin, Heðin á Lakjuni, sum týðuliga hevur verið darvaður av skaða, við í málunum.

Í fyrsta førinum var tað Paul Clapson, sum úr stuttari fjarstøðu og við høvdinum stýrdi bóltinum í málið. Innleggið var komið úr høgru og tvørturum til Heðin á Lakjuni, sum legði tvørtur um aftur til handara stólpan.

Í næsta førinum var Heðin á Lakjuni málskjútti. Marek Wierzbicki legði flatt innfyri úr vinstru, og Heðin á Lakuni var fyrstur á bóltinum við nærra stólpan.

Í triðja førinum átti Heðin á Lakjuni innleggið úr vinstru. Aftanfyri handara stólpan legði Hjalgrím Elttør við høvdinum upp á tvørs aftur, og tveir metrar frá málstrikuni var tað Jan Andreasen, sum við høvdinum skumpaði bóltin í málið.

### Áttu sínar royndir

Støðutalvan boðar frá, at tað stendur einki serligt til hjá einasta liðnum í bestu deildini í Suðuroy. Men VB/Sumba var ikki fyri ongum í Klaksvík. Teir vístu góðan hugburð, og teir høvdu sínar møguleikar, sum kundu havt givið mál. Tað gjørdu teir ikki. Eitt nú tí Meinhardt Joensen stóð seg væl í KÍ málinum.

Serliga í vinstra borði vóru einstøku álopsroyndirnar hjá VB/Sumba í 1. hálvleiki. Unglingaspælarin Henning Joensen bjóðaði Marek av í eini móti einum. Tað eydnaðist unga manninum onkra ferðina at bróta ígjøgnum, og Kári í Lágabø fekk eftir innlegg frá Henningi fyltan møguleika, sum einki kortini spurdist burturúr.

Eftir steðgin saðlaði KÍ um. Ovi Nysted, sum hevði verið í miðverjuni, varð fluttur fram í álopið, har hann løtu seinni varð avloystur av Steffan Kalsø. Jan Andreasen fór í miðverjuna, og tað var kanska meiri 4-2-4 enn 4-4-2. Undan steðginum hevði KÍ ofta megnað at hildið bóltinum á jørðini. Tað eydnaðist ikki so væl eftir steðgin. Hóast teir høvdu verið undir taki og hvílt seg, so kendist tað mest sum um, at spælararnir fingu sær eyka hvíld fyrstu løtuna eftir steðgin.

Jón Krosslá Poulsen hevði tvær góðar royndir móti KÍ málinum, uttan at tær góvu mál. Í fyrra førinum var talan um skot úr høgru, og í seinna førinum royndi hann við høvdinum eitt sindur úr vinstru.

Síðstu løtuna spruttaði KÍ aftur. Men tað spurdust ikki fleiri mál burturúr, og nú hava tey í Klaksvík eyguni vend móti tunnilsmunnanum og ókeypis biltúrinum út á Svangaskarð næsta sunnudag. Í VB/Sumba hugsa tey um lagnuferðina til Fuglafirðar síðsta dagin í apríl mánað!



*Heðin á Lakjuni hevur verið darvaður av skaða, men kortini var hann stóri maðurin í dystinum, tá VB/Sumba sum seinasta útiliðið við Djúpumýri varð sent stigaleyst við Dúgvuni*

*sanvsmynd*

## Leita eftir fólki

Hóast teir taptu 3-0, so vóru teir í VB/Sumba leguni ikki ónøgdir við teirra avrik í Klaksvík:

– Talan er um støðuga framgongd, og vit rokna framvegis við, at tað skal bera til at røkka málinum, sum er at varðveita plássið í deildini. Ferðin til Fuglafirðar sunnudagin verður sera týdningarmikil, staðfestu suðuroyingarnir, sum iðraðu seg um, at teir høvdu givið bílig mál burtur.

VB/Sumba hevði sunnudagin tveir nýggjar menn á liðnum. Annar teirra var Bergur Djurhuus, sum hevur røtur í Suðuroy, og sum áður hevur spælt við NSÍ. Hin var Jón Samuelsen, sum ongantíð áður hevur verið á besta liðnum. Hann kom á vøllin, tá ið 2. hálvleikur var átta minuttir gamal.

– Vit arbeiða við at fáa styrk til besta liðið, men enn ber einki til at siga, hvussu tað verður við hesum, siga teir í VB/Sumba.

**-jh**

## Spælið fer at batna

Jan Andreasen, sum so at siga altíð hevur verið miðverji, hevur higartil í ár fyri tað mesta verið á KÍ miðvøllinum. Sunnudagin skoraði hann síðsta málið í 3-0 sigrinum.

– Vit eru tvey stig frá toppinum, og vit kunnu ikki annað enn vera nøgdir. Kanska kundu vit havt vunnið størri sigur hesa ferð, men 3-0 er í lagi.

– Allir taka uppgávuna í størum álvara, og disiplinin er góð. Spælið hevur ikki verið so ógvuliga gott. Í løtum var tað gott hesa ferð, og tað fer ivaleyst at batna, heldur Jan Andreasen, sum saman við hinum í KÍ nú gleðir seg til ferðina á turrum og í bussi allan vegin út á Svangaskarð.

**-jh**